# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

2007 GERMANY
HANDBALL WORLD CHAMPIONSHIP

Bólkur C:

# Heimavøllurin skal bera Týskland

**Týskland hevur framt eitt ættarliðsskifti á hondbóltslandsliðnum, og nú skulu ungu leikararnir royna at fáa eitt gott úrslit, tá teir hýsa HM í Týsklandi**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Týskland hevur í nógv ár verið ein av heimsins størstu hondbóltstjóðum, men eftir silvurheiðursmerkið í OL 2004 hevur ikki gingið heilt eftir vild. Nú hava teir aftur møguleikan at fáa eitt gott úrslit, tá teir sjálvir hýsa HM-endaspælinum. Teir hava fingið eitt gott lutakast, har teir eru endaðir í bólki saman við Póllandi, Brasilia og Argentina.

### Verjan skal vísa vegin

Týskland hevur verið við í øllum HM-endaspølunum í manshondbólti higartil. Undan samanleggingini var landið altíð umboðað antin av Vesturtýsklandi ella av Eysturtýsklandi, og síðani Týskland bleiv ein sameind tjóð hevur landið tikið lut í hvørjum HM-endaspæli.

Úrslitini hava eisini verið avbera góð, men síðani silvurheiðursmerkið í OL í 2004 hevur gingið niður á bakka. Venjarin við tí kenda yvirskegginum, Heiner Brand, valdi tá at fremja eitt ættarliðsskifti, og ungu leikararnir hava havt brúk fyri tíð at gerast klárir til stóru endaspølini.

Nú tykjast ungu leikararnir meir klárir enn nakrantíð, og heimavøllurin fer óivað at hjálpa teimum í teirra royndum at røkka heiðursmerkjaplássi.



*Royndi málverjin, Henning Fritz, verður ein av berandi kreftunum á týska liðnum, sum skal royna at fáa*

### Pólland kann hótta Týskland

Pólland er liðið, sum eftir øllum at døma fer at geva Týsklandi størstu mótstøðuna. Teir máttu út í ein play-off dyst fyri at røkka HM-endaspælinum, og her vunnu teir á Grikkalandi. Serliga á heimavølli vísti verjan spæl í heimsflokki, og tað verður eisini verjan og málverjin, sum skulu hjálpa póllendingum á teirra vegi til millumspælið.

Pólland hevur eitt gott lið við nógvum góðum leikarum, sum dagliga spæla í týsku bundesliguni. Serliga tveir leikarar hava stóran týdning á landsliðnum. Teir eru málverjin, Slavomir Szmal, og høgri bakkurin, Marcin Lijewski.

### Suðuramerikanskur íblástur

Tey bæði síðstu liðini í bólkinum eru bæði frá Suðuramerika. Her er talan um Brasilia og Argentina. Hóast hesi bæði londini ikki hava tað heilt stóra at vísa á í HM-høpi, so hava tey fleiri serstakliga góð úrslit at vísa á. Serliga Argentina fekk eitt gott úrslit í HM í 2003. Tá byrjaðu teir við at vinna á Kroatia og spæla javnt ímóti Russlandi, men eftir hetta steðgaði upp. Slík úrslit vísa tó, at londini úr Suðuramerika ikki eru til at spæla við.

**Bólkur C:**
Týskland
Pólland
Brasilia
Argentina

**Bólkur D:**
Spania
Egyptaland
Kekkia
Qatar

Bólkur D:

# Spania skal verja HM-heitið

**Heimsmeistararnir úr Spania skuldu ikki fingið stórvegis trupulleikar við at spælt seg víðari úr hesum bólkinum. Meir spennandi verður at fylgja gongdini hjá Egyptalandi og Kekkia, sum hava tvey spennandi lið**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Iker Romero var stóra stjørnan, tá Spania vann HM í 2005. Nú skal hann royna at føra Spania fram til enn eitt meistaraheitið.*

Bólkur D inniheldur trý sera spennandi lið, har heimsmeistararnir úr Spania eru størstu favorittarnir. Teir fara helst at vinna bólkin, men teir skulu møta tveimum spennandi liðum á vegnum. Her er talan um Egyptaland, sum fyrr hevur fingið góð úrslit í HM, og eitt av gomlu stórveldunum í hondbólti, Kekkia, sum tykist vera vakna úr dvala eftir fleiri sera løk ár í manshondbólti. Síðsta liðið í bólkinum er Qatar.

### Spania er ein av favorittunum

Spania hevur verið vælsignað við nógvum fram úr góðum hondbóltsspælarum, men tað hevur gingið striltið hjá teimum at fáa nakað burtur úr góðu evnunum.

Trupulleikin hevur verið at fingið leikararnar frá teimum trimum stóru liðunum í Spania, Portland San Antonio, FC Barcelona og Ciudad Real, at leika saman, tí rivaliseringin millum liðini hevur verið so stór. Núverandi venjarin, Juan Carlos Pastor, hevur tó fingið spælararnar at leika sum eitt lið, og úrslitið var eitt gullheiðursmerki til seinasta HM.

Nú er spurningurin, um Spania, við Iker Romero á odda, megnar at endurvinna meistaraheitið.

### Zaki skal fáa gongd á

Egyptaland er eitt av spennandi liðunum, sum er enda í bólki saman við heimsmeistarunum. Teir hava fyrr fingið sera góð úrslit í HM-høpi, og í 2001 vóru teir sera tætt við at gerast fyrsta landið uttanfyri Evropa, sum fekk heiðursmerki í einum HM-endaspæli.

Hetta árið bleiv ein nýggj stjørna fødd. Navnið var Hussein Ali Zaki, og hann er enn ein av berandi kreftunum á egyptiska liðnum. Hann hevur tó havt stórar trupulleikar við at fáa sítt egna spæl at rigga síaðni 2001, men fær hann gongd á, so er hann ikki til at steðga. Hann er eisini maðurin, sum egyptar leggja sínar vónir á.

### Kekkia vakna úr dvala

Triðja liðið, sum hevur ein erligan møguleika at røkka millumspælið, er Kekkia. Fyrrverandi stórveldið í manshondbólti hevur mest sum ligið í dvala í nógv ár, men nú tykjast teir aftur vera á rættari leið.

Stóra stjørnan hjá Kekkia er høgri vongurin, Jan Filip, og hann er ein av teimum, sum skal bera Kekkia fram í HM.

Síðsta liðið í bólkinum er Qatar, sum ikki verður mett at hava nakran møguleika ímóti hinum londunum í bólkinum.